# Ein lívæðr kann ikki privatiserast

Ferðasambandið út í heim kann ikki leggjast í hendurnar á felag, sum kann fara av knóranum, ella sum byrjar at skelva í einum lágkonjunkturi. Fíggjarkreppan úti í heimi í dag kundi havt lagt landið lamið! Lívæðrin hjá føroyingum kann ikki latast upp í hendurnar á tilvildarligum rationellum íleggjarum. Flogleiðin út í heim er lívæðrin og hóskar ikki at vera privatiserað, skrivar Óli Samró í vinnukronikkini í dag

**VINNU-KRONIKKIN**
*Óli Samró*



Eg vil heita á landsstýrismannin í vinnumálum um at fyrireika uppskot at leggja skjótast møguligt fyri Føroya Løgting um:

a. at steðga privatiseringini av Atlantic Airways og keypa seldu partabrøvini
b. at tryggja eitt regluligt rutunet alt árið millum Føroyar og Danmark, Ísland, Norra, Stórabretland og beinleiðis til europeiska meginlandið. Hetta kann best gerast við, at landið eigur og rekur sítt egna flogfelag - Atlantic Airways - ella í øðrum lagi at ein konsessión við einum kravdum rutuneti verður boðin út (sami leistur sum Bygdaleiðir)
c. at tryggja ein ferðakostnað, sum ger, at tað ber til hjá fólki, sum býr í Føroyum at sleppa uttanlands, og hjá fólki, ið býr uttanlands, at koma til Føroyar.

**Ásanning I: Føroyar eru ein útoyggj**

Føroyar eru ein útoyggj - punktum. Infrastrukturin má tí byggja á tann veruleikan. Fólkatalið er lítið og veksur ikki, og fólkapýramidan er sum hjá hóttum samfeløgum.

Teinurin niður á meginlandið er útmóti 2.000 km - tveir tímar at flúgva og hálvtannað samdøgur at sigla!

Fjarleikan kann einki gerast við!

Tað er veruleikin; eins og Fugloy liggur fjarskotin frá Tórshavn og Stóra Dímun liggur avskorin mitt í Suðuroyarfirði.

Infrastrukturur knýttur at útoyggjum má viðgerast ymiskt frá vanligum fólkaumráðum. Eins og Smyril knýtir Suðuroynna til restina av Føroyum, mugu flogførini knýta Føroyar saman við restina av heiminum.

**Ásanning II: Ikki liberalt grundarlag**

Tað er ein hvørvisjón, at vanlig liberal flúgving er ella kemur á føroyarutuni. Farleiðin kann ikki rekast, har prísásetan, rutunet og tænastur verða boðin út á vanligum liberalum grundarlagi.

Maersk Air gavst at flúgva eftir o.u. 35 ár. Tað skal undra nógv, um eitt útlendskt flogfelag nakrantíð fer at flúgva til Føroyar aftur! Fólkagrundarlagið er lítið. Bert rutan til Keypmannahavn er fíggjarliga áhugaverd. Haraftrat er stór óvissa knýtt at lendingarviðurskiftum, og tí má leggjast nógv uppfyri óvissum regulariteti.

Faroe Jet helt í eitt hálvt ár, tá var fíggjarliga grundarlagið burtur, og er tað óhugsandi, at nakar í Føroyum fer í holt við flúgving aftur í bræði.

**Ásanning III: Ambulansutænasta**

Flogførini hjá Atlantic Airways eru flúgvandi sjúkrabilar. Eitt stórt tal av fólki hava tørv á hesi bráðfeingis ambulansutænasta. Helst eru í hvørjum flogfari fleiri fólk ávegis til sjúkraviðgerð - ofta í børu - í fylgi við læknum og sjúkrarøktarfrøðingum.

Tann flúgvandi ambulansutænastan eigur lívið í nógvum!

**Ásanning IV: Álítandi og bílig flúgving er lívsgrundarlagið hjá nútímans fólki**

Føroyar liva í nógv størri mun av fólki, sum ferðast til og úr Føroyum. Um fá ár hava inntøkurnar frá fólki, sum selja sínar tænastur uttanlands, helst fleiri ferðir so stóran týdning fyri føroyska búskapin sum fiskivinnan kring Føroyar. Um tað verður 5-10 ella 20 ferðir, ja tað fer tíðin at vísa.

Longu í dag er flogleiðin grundarlagið hjá helst túsundtals føroyingum, ið vinna til lívsins uppihald úti í heimi. Føroyingar ferðast 2-8 vikur út at arbeiða og flúgva so aftur til Føroyar. Hesi eru siglandi, í oljuvinnu, í fiskivinnu, fíggjarvinnu, serfrøðingar hjá virkjum og ráðgevarar.

Í einum flogfari er ein vaksandi partur av teimum ferðandi nútímans føroyingar, sum pendla út í heim at virka, meðan familjan býr í Føroyum!

Vit tosa her um hálønt, útbúgvin fólk og fleiri í leiðandi starvi!

Álítandi og bíligt ferðasamband er ein fyritreyt fyri virkseminum hjá hesum nýggja og skjótt vaksandi bólki.

Hesi eru grundarlagið undir tí nútímans føroyska búskapinum!

**Ásanning V: Tyrluflúgving**

Tyrluflúgvingin út á útoyggjarnar og bjargingartænastan er ófrávíkilig tænasta. Henda tænasta má standa rimmarføst, líkamikið hvussu vanligi raksturin hjá einum flogfelag er.

**Ásanning VI: Kann ikki halda fram sum nú**

Seinastu tíðina hevur verið nærum ómøguligt at fáa ferðaseðil til og úr Føroyum við stuttum skotbrái. Atlantic Airways skal vinna pening, og tað gerst sjálvandi best við fullum flogførum, og sjálvandi við at so nógv ferðandi sum møguligt gjalda fullan prís.

Landsins myndugleiki má við konsessión ella við at eiga Atlantic Airways 100% tryggja eina príslegu, sum ger tað møguligt hjá privatfólki og vinnuni at ferðast til og úr Føroyum - ikki bara til og frá Danmark men eisini Miðeuropa.



**Endi**

Væl veit eg, at liberalisering av luftrúminum er ein av fyritreytunum hjá Føroyum fyri at koma við í altjóða samstarv. Men tað má bera til at fáa undantak, tá hetta er ein lívæðr, og grundarlag ikki er at reka leiðina vinnuliga.

Væl veit eg eisini, at ein flogleið eins og tænastuveitingar sum heild hóska illa at vera almennar. Vónandi verða tað fleiri enn eg, sum fara at ganga uppá kompromis við teirra liberalu hugsjón og búskaparligu trúgv annars, og ístaðin síggja sambandið út í heim, sum ein part av almenna infrakervinum á sama hátt sum vegasamband, brýr og tunlar.

Ferðasambandið út í heim kann ikki leggjast í hendurnar á felagi, sum kann fara av knóranum, ella sum byrjar at skelva í einum lágkonjunkturi. Fíggjarkreppan úti í heimi í dag kundi havt lagt landið lamið!

Lívæðrin hjá føroyingum kann ikki latast upp í hendurnar á tilvildarligum rationellum íleggjarum.

Flogleiðin út í heim er lívæðrin og hóskar ikki at vera privatiserað!